# USA FINGIÐ HEILSU-VÁTTAN

**VÆLFERÐ** Hin 22. mars 2010 fer altíð at standa sum ein serligur dagur í politisku og sosialu søgu USA. Hetta var dagurin, har stóri heilsureformurin hjá Obama varð samtyktur. Ein reformur, sum hevur verið ávegis í áratíggju, og sum ætlandi skal spara samfelagnum fyri hundraðtals milliónir, umframt at bøta um heilsutænastuna.



– En vanliga amerikansk familja brúkar umleið 60.000 krónur árliga til sjúkratryggingar. Fólk rinda sjálvi tryggingina gjøgnum arbeiðsgevaran.

– Flestu amerikanarar hava sína egnu heilsutrygging. Men umleið 47 milliónir hava onga trygging. Tey eru ikki nóg fátøk ella gomul til at verða umfata av Medicaid skipanini, sum saman við Medicare, varð sett á stovn í 1960unum. Hetta vóru slóðbrótandi skipanir, sum broytti lívið hjá milliónum tá.

– Tey, sum onga trygging hava, koma ofta ov seint undir læknahond. Ella tey fáa hjálp á skaðastovuni, tá heilt illa veit við.

– Amerikanska heilsuskipanin er millum heimsins dýrastu. Heilivágur er nógv dýrari enn í grannalandinum Canada. Hópin av peningi fer til starvsfólk í tryggingarfeløgunum. Sostatt fer sera nógvur peningur til lønir í staðin fyri til heilsu.

*Kelda: Niels Bjerre-Poulsen, lektorur, DR*

**Rigmor Dam**

Her í norðurlondum kenna vit ræðumyndina úr USA, har álvarsliga løstaði sjúklinginum, ella konan, sum er komin at eiga, verða tveitt á dyr á sjúkrahúsinum, tí tey hava onga sjúkratrygging. Ella familjan, sum noyðist at velja at rinda kostnaðarmiklar sjúkratryggingar, í staðin fyri at spara upp til útbúgving til børnini.

Fyri flest øll í norðurlondum hevur tað altíð verið óskiljandi, at landið, sum verður rópt heimsins ríkasta, máttmiklasta og ikki minst Guds útvalda, kundi liva við eini skipan, har hvør ræður sær og bert tey vælbjargaðu fáa tilboð um heilsuhjálp, tá ið á stendur.

**» Vit eru á røttu leið**

Men í USA, har fólkið ikki kennir til annað, hevur hetta verið veruleikin, sum ikki hevur staðið at broyta. Eisini hóast fleiri forsetar, guvernørar og felagsskapir hava stríðst fyri einari almennari heilsutrygd í mannaminni. Líka síðan Theodore Roosevelt, ex-forseti, fyrstu ferð lat upp fyri tankanum longu í 1912 til Bill Clinton gjørdi tað sama, seinast í 1994.

Men Obama megnaði tað, sum ongin annar megnaði. At fáa meiriluta fyri einum heilsureformi, sum merkir, at teir omanfyri 300 milliónir borgarnarnir fáa rætt til almenna sjúkratrygging fyri fyrstu ferð í søgu landsins. Hetta fer eitt nú at koma teimum 32 milliónunum, sum ongan sjúkratrygging hava, til gagns. Umframt at fátækastu fólkini í landinum eisini verða umfatað av heilsutrygginini.

Heilsureformurin er tann størsti av sínum slag síðan Lyndon B. Johnson, forseti, setti í verk heilsutryggingarnar Medicare og Mediaid í 1965.

## Ongin abort upp á landsins besta

Við 219 atkvøðum fyri og 212 ómóti varð reformurin samtyktur í Umboðsmannatinginum náttina millum sunnudag og mánadag hin 21.-22. mars 2010. Eftir eitt tímalangt og kensluborið orðaskifti millum demokratar og republikanarar.

Stóra stríðsmálið var fosturtøka. Um landið eisini skuldi rinda fyri fosturtøku, var ógjørligt at fáa meiriluta fyri uppskotinum. Tíðliga sunnudagin tryggjaði Obama sær tí tær seinastu skeptisku demokratisku atkvøðurnar, við at lova, at fosturtøka ikki verður fevnd av lógini.

## Hell no!

Røðurnar fyri og ímóti komu víða um. Uppskotið varð rópt tann reina kommunisma, meðan onnur samanbóru stórhendingar sum mánaferðina á sinni. Republikanski minnilutaleiðarin, John Boehner, vísti sína vanvirðing við at geyla "Hell, no!" út í salin – og ruðuleikin var fullgjørdur.

Men, atkvøðast skuldi. Og tá ja-atkvøðurnar komu upp á tær magiska 216 fyri, skóru demokratarnir í fagnaðarróp og lógvabrestirnir hoyrdust út í tún, meðan teir róptu »Yes, we can«, ið sum kunnugt er herróp Obama.

## Stórsigur fyri fólkið

Við miðlarnar segði Obama, at talan er um ein stórsigur fyri amerikanska fólkið.

– Reformurin er ikki loysnin á øllum trupulleikum í amerikanska heilsuverkinum. Men vit eru á røttu leið. Soleiðis eru broytingar.

Eitt av høvuðsargumentunum hjá Obama hevur verið, at reformurin skal steðga eyðræninginum hjá tryggingarfeløgunum, og tryggja borgarunum móti at verða tilvildarliga blakaðir úr sjúkratryggingarskipanunum.

Politiskt óhefta fíggjarskrivstovan hjá kongressini hevur roknað út, at heilsureformurin kemur at spara amerikanska samfelagnum 550 mia kr. komandi 10 árini.

## Elddópur Obama

Men fyri Obama er heilsureformurin ikki bara enn eitt politiskt úrslit. Politiskir eygleiðarar hava leingi mett, at reformurin snýr seg um nógv annað enn bara amerikonsku heilsuskipanina.

Eitt nú segði Niels Bjerre-Poulsen, lektorur og serfrøðingur í USA, við P1 á DE, at heilsureformurin er vorðin sjálv ímyndin av leiklutinum hjá Obama sum forseti. Megnaðu mótstøðufólkini at forða reforminum, hevði tað verið banahøggur Obama – og møguliga eisini Demokratanna í hesum umfari.

*rigmor@sosialurin.fo*